# Børnini eiga symfoniorkestrið



Hesa vikuna eiga børnini Føroya Symfoniorkestur, sum í ár kann hátíðarhalda sín 25 ára føðingardag

BARNAKONSERT

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fyrsta tiltakið til tess at hátíðarhalda dagin, er hesa vikuna, tá orkestrið hevur bjóðað øllum børnum í Føroyum frá trý ára aldri til og við skúlabørn í 3. flokki til ókeypis konsertir.

Poul Jákup Thomsen, formaður í Føroya Symfoniorkestri sigur, at allir barnagarðar og skúlar í Føroyum hava fingið innbjóðing, og vænta tey at eini 4.000 børn fara at lýða á orkestrið hesa vikuna.

Á skránni verður lættur tónleikur, ein sýning av ymsu instrumentunum og instrumentbólkunum í orkestrinum, framførsla av eini tónleikasøgu við frásøgufólki, og at enda fara børnini saman við orkestrinum at syngja nakrar føroyskar barnasangir.

Føroya Symfoniorkestur hevur lagt nakrar av barnasangunum á heimasíðuna, so børnini kunnu læra seg sangirnar, áðrenn tey koma til konsertina. Heimasíðan hjá Føroya Symfoniorkestri er at finna á www. fso.fo

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regn ella sirm av og á. Um kvøldið minni vindur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og sirm ella mjørki av og á. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul millum eystan og sunnan og regn eitt skifti, annars támut veður. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og regn. Sunnudagin minni vindur av útsynningi og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 22 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 11 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. við Lofoten fer suðureftir. Eitt lágtrýst, 974 hPa. á 53N~34V stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani kemur hendavegin.



**Í dag:**
Hátrýstið yvir Suður~Skandinavia fer spakuliga í landsynning. Brúgvalagið skamt í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/4 kl. 06⁰⁰ – 21/4 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 20/4 kl. 06⁰⁰ – 21/4 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 33 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

20.apríl Fullmáni
23.apríl Mánin longst frá jørðini
28.apríl Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22.apríl | 8:50 | 21:12 | 7:50 | 20:12 | 8:05 | 20:27 | 10:50 | 23:12 | 11:50 | - | 7:05 | 19:27 | 6:05 | 18:27 | 9:05 | 21:27 | 10:05 | 22:27 | 8:35 | 20:57 | 9:50 | 22:12 |
| 23.apríl | 9:35 | 21:57 | 8:35 | 20:57 | 8:50 | 21:12 | 11:35 | 23:57 | 0:12 | 12:35 | 7:50 | 20:12 | 6:50 | 19:12 | 9:50 | 22:12 | 10:50 | 23:12 | 9:20 | 21:42 | 10:35 | 22:57 |
| 24.apríl | 10:19 | 22:41 | 9:19 | 21:41 | 9:34 | 21:56 | - | 12:19 | 0:57 | 13:19 | 8:34 | 20:56 | 7:34 | 19:56 | 10:34 | 22:56 | 11:34 | 23:56 | 10:04 | 22:26 | 11:19 | 23:41 |
| 25.apríl | 11:04 | 23:26 | 10:04 | 22:26 | 10:19 | 22:41 | 0:41 | 13:04 | 1:41 | 14:04 | 9:19 | 21:41 | 8:19 | 20:41 | 11:19 | 23:41 | - | 12:19 | 10:49 | 23:11 | - | 12:04 |
| 26.apríl | 11:49 | - | 10:49 | 23:12 | 11:04 | 23:27 | 1:26 | 13:49 | 2:26 | 14:49 | 10:04 | 22:27 | 9:04 | 21:27 | - | 12:04 | 0:41 | 13:04 | 11:34 | 23:57 | 0:26 | 12:49 |

Alt um harmonikur

www.simme.eu